VIÐMERKINGAR

Fyrstu 100 dagarnir

Helgi Abrahamsen

Longu áðrenn fólkatingsvalið í Danmark tann 20. november í fjør, boðaðu Vinstri- og Konservativi flokkurin frá, hvørji mál teir høvdu sett sær fyri at loysa, áðrenn teir fyrstu 100 dagarnir vóru farnir av einum møguligum stjórnarskeiði.

Aftaná valið skipaðu flokkarnir stjórn, og 100 dagar seinni kundu teir stoltir vísa á, at øll vallyftini vóru hildin.

100 dagar í Føroyum

Í Føroyum høvdu vit eisini løgtingsval tann 30. apríl í ár. Striltið gekk at skipa landsstýrissamgongu, tí teir sum taptu valið, vildu ikki leggja frá sær. Sjálvstýrisflokkurin bleiv mestsum innlimaður í Fólkaflokkin, tí umráðandi var, at vinnarin av valinum varð hildin uttanfyri alla ávirkan, fyri at kósin hjá fullveldislandsstýrinum kundi verða hildin.

Ein skuldi trúð, at visiónirnar hjá nýggja landsstýrinum vóru øgiligar, tí ikki færri enn átta landsstýrisfólk, umframt løgmann, skuldu manna sessirnar, og tvey nýggj aðalstýri vórðu eisini sett á stovn. Ein nýggjur aðalstjóri er longu settur, og tann næsti er væl á veg.

Samgonguskjalið varð undirskrivað tann 6. juni, og hevði tað føroyska samgongusamstarvið sostatt vart í 100 dagar sjálvan 14. september. Henda dagin plagar í hvussu so er tann eini samgonguflokkurin at gera nógv burturúr eini ávísari søguligari hending, so tað var upplagt, at 100-daga-avrikini eisini fóru at verða flættaði inn í onkra av røðunum á Café Nátúr.

Tvey uppskot og fimm ósemjur

Hvørji eru so avrikini, sum røðararnir kundu reypa av ?

Tvey lógaruppskot eru higartil løgd fyri tingið, har annað var ein eykajáttanarlóg (sum landsstýrið sambært stýrisskipanarlógini var noytt til at leggjast fram), og hitt var ásetingin av fiskidøgum (sum sambært lógini um vinnuligan fiskiskap skal verða avgreidd í seinasta lagi tann 18. august). Tað vil siga, at í báðum førðum var talan um uppskot, sum landsstýrið sambært lóg var tvingað at leggja fyri tingið.

Hini seks landsstýrisfólkini og løgmaður, eru enn ikki komin í tingið við sínum fyrsta lógaruppskoti. Kortini hava fimm stórar ósemjur verið í samgong uni higartil, sum beinleiðis hava hótt samgongusamstarvið.

Seinasta ósemjan er um nývaldu Siðsemisnevndina, og har er veruligt rumbul í málinum. Ein landsstýrismaður velur nøkur fólk í eina nevnd, men aftaná fáa hesi fólkini at vita av tingsins røðarapalli, at tey eru óegnaði at sita har.

Soleiðis kunnu fólk ikki verða viðfarin av eini landsstýrissamgongu!

Ikki ráðiligt at yvirtaka meira

Danska stjórnin visti hvat hon vildi, tá hon tók við. Har vóru greiðir málsetningar, sum veljarin annaðhvørt kundi vera samdur, ella ósamdur við.

Í Føroyum vóru málsetningarnir harafturímóti ikki so greiðir. Týdningarmesta málið var eftir øllum at døma at halda Sambandsflokkin uttanfyri alla ávirkan, men innanfyri hevur verið eitt eljustrið, og úrslit sígggja vit eingi.

Og kortini so sigst at samgonguflokkarnir vilja yvirtaka øll málsøki (fyrireikaði sum ófyrireikaði), tí í Føroyum skulu tey liggja í betri hondum enn í Danmark. - Trúgvi hvørið trúgva vil.

- Soleiðis gingu hesir fyrstu 100 dagarnir hjá landsstýrissamgonguni.

Færøernes fremtid, lykke & håb !

Meiling Wung-Sung
Argir

Lykkeligt, at der endnu er en rest tilbage af Guds folk på Færøernes!

Færøernes fremgang, velstand og succes er ene og alene beroende på, at der er mennesker her, som lever et engageret liv sammen med den Gud, der skabte mennesket.

Guds tanke med os mennesker er, at vi skal leve livet her på jorden sammen med hinanden i oprigtig kærlighed.

Glæde os sammen over, at Han elsker os med en så stor kærlighed, at Han ønsker hver og en af os hjemme hos sig til et evigt liv i Himmelen.

Vi skal støtte og opmuntre hinanden til at leve et liv, som svarer til Bibelens forskrifter.

Det er den kærlighed, som vi kan række ud til hinanden, og som er eneste opløsning i møde.

Derfor er det glædeligt, at de kristne holdninger endnu præger Færøernes lovgivning.

Frá dreymi til veruleika

Hóast bert 22 ár letur Alma á Lava upp sín egna ítróttahandil

NÝGGJUR ÍTRÓTTAHANDIL
Sólrun Hansen og Anja Brekkstein

Tað hevur altið dreymurin hjá 22 ára gomu Almu á Lava at fingið sín egnan handil, og nú hevur hon gjørt dreym til veruleika. Týsmorgunin letur hon sín egna handil upp.

Mynd: Álvur Haraldsen.

Í morgun(týsmorgunin) klokkan 09.00 opnaði nýggjur ítróttahandil í Handilskjarnanum í Miðbýnum í Havn. Tað er 22 ára gamla havnagentan Alma á Lava, ið hevur tikið hetta stigið.

- Síðan eg var liðug við fólkaskúlan, havi eg arbeitt og spart pengar upp til ein møguligan handil. Eg havi altíð vilja havt mín egna handil, og í dag verður so dreymurin til veruleika. Hetta sigur 22 ára gamla Alma á Lava úr Havn, við Sosialin.

Alma hevur í 3 ár verið í læru hjá Thomas Dam ítrótti. Í lærutíðini hevur hon verið í Danmark fýra ferðir í skúla og lært um ymisk ítóttarkleði og ítóttarskógvar. Har víðkaði hon um sín kunnleika um ítróttaklæði og lærdi, at tað eisini liggja tankar aftanfyri framleiðsluna av klæðum og búnum til ítróttaendamál. Merkini, ið hon fer at selja eru Nike, Human og ymisk onnur merkir av góðum slagi.

Ítóttarhandilin, sum fer at halda har kiosk centrum var, er bert 50 fermetrar, men tó skal tað verða pláss til ítróttaklæðir bæði til menn, kvinnur og børn.

– Grundin til, at handilin er so lítil, er fyri at kundin skal fáa tað honum ynskir, sigur Alma á Lava.

Fischer bjargaði Schrøder

Reyð-grøna stjórnin í Týsklandi heldur fram, men afturgongdin hjá sosialdemokratunum ger, at tann komandi stjórnin verður ikki so sterk sum tann undanfarna

TÝSKA VALIÐ
Árni Joensen:

Gerhard Schrøder greiðir atkvøðu í Hannover sunudagin. Eftir valið kann hann halda fram, men noyðist at takka Teimum Grønu fyri, at samgonguni varð lív lagað

Gerhard Schrøder heldur fram sum týskur kanslari, men hann kann takka Teimum Grønu fyri afturvalið.

Undan valinum vóru tað mong, sum høvdu hug at sera Tey Grønu uttan fyri framtíðina í týskum politikki, og veljarakanningar bendu eisini á, at flokkurin fór at liggja um minstamarkið, sum er fimm prosent av atkvøðunum. Tí kom tað óvart á fleiri, tá flokkurin fekk 8,6 prosent sunnudagin. Men eygleiðararnir eru samstundis á einum máli um, at formaðurin, Joschka Fischer, eigur ein stóran part av æruni av sigrinum, tí hann hevur enn einaferð prógvað, at hann er ein tann best umtókti politikarin í Týsklandi.

Uttan framgongdina hjá Teimum Grønu hevði Gerhard Schrøder fallið sunnudagin, og so hevði týski kanslarin itið Edmund Stoiber.

306 av 603

Sum væntað fingu sosialdemokratarnir afturgongd. Afturgongdin var 2,4 prosentstig, og flokkurin endaði á 38,5 prosentum. Tann konservativa samgongan CSU og CDU fekk eisini 38,5 prosent. Tey Grønu fingu 8,6 prosent, meðan Fríu Demokratarnir FDP fingu 7,4 prosent. Serliga úrslitið hjá FDP var vánaligt. Flokkurin hevði sett sær sum mál at fáa 18 prosent av atkvøðunum, men fekk minni enn helvtina.

Í tinginum í Berlin gevur úrslitið sosialdemokratunum 251 umboð og Teimum Grønu 55. Teir báðir flokkarnir hava sostatt 306 av teimum 603 tingumboðunum og harvið tann neyðuga meirilutan.

Teir konservativu fingu 248 tingsessir og FDP 47 ella tilsamans 295. Teir báðir seinastu sessirnir fóru til fyrrverandi kommunistarnar PDS. Flokkurin rakk ikki upp um minstamarkið og misti allar sínar 36 tingmenn, men fekk tveir beinleiðis valdar tingmenn.

Stjórnin viknað

Edmund Stoiber viðgekk gjáranáttina ósigurin, hóast hann kundi fegnast um framgongdina hjá teimum konservativu. Hann væntaði kortini ikki, og tann komandi stjórnin fer at halda leingi og neyvan árið út.

Politiskir eygleiðarar í Berlin siga, at hóast Gerhard Schrøder heldur fram í kanslarastólinum, er tann reyð-grøna stjórnin ikki so sterk, sum hon var undan valinum.

Tað er heldur ikki greitt, at Tey Grønu fara at krevja størri ávirkan á politikkin og fleiri ráðharrasessir, nú flokkurin bjargaði kanslaranum og samgonguni.

Ivi um, hvat Ísrael ætlar

Ein ísraelskur ráðharri hevur sagt, at palestinski leiðarin, Yasser Arafat, skal rekast í útlegd, men ein annar avsannar, at tað er ætlanin

MIÐEYSTUR
Árni Joensen:

Síðani hósdagin hevur ísraelski herurin kringsett høvuðsstøðina hjá Yasser Arafat í býnum Ramallah á Vestara Árbakka, og fleiri av bygningunum eru síðani lagdir í sor.

Spurningurin hevur verið, hvat ísraelsmenn ætla við átakinum, men sunnudagin kom Weizman Shiri, varaverjumálaráðharri við einum svari, tá hann segði, at herurin fer ikki at gera Arafat nakað mein ella at taka støð hansara, men at ætlanin er at noyða palestinska leiðaran at gera av, hvagar hann ætlar sær at fara.

Weizman Shiri segði hetta í samrøðu við ísraelska sjónvarpið, men bert fáar tímar seinni segði Shimon Peres, uttanríkisráðharri við amerikanska sjónvarpið CNN, at Ísrael fer ikki at reka Arafat av landinum.

– Vit hava ongar ætlanir um at vísa honum burtur. Vit ætla heldur ikki at beina fyri honum. Men vit vilja hava prógv fyri, at hann hevur tamarhald á sínum egnu. Kann hann ikki tað, mugu palestinar fáa eina nýggja leiðslu, segði Peres.

Amerikanska stjórnin hevur sagt, at ísraelska avgerðin at kringseta høvuðsstøðina hjá Arafat fer ikki at gera enda á palestinsku sjálvmorðsatsóknunum í Ísrael. Men ísraelska stjórnin sýtir fyri at taka herin aftur. Stjórnin sigur, at tjúgu palestinar, sum eru undir illgruna fyri yvirgang, hava leitað sær skjól á støðini hjá Arafat, og teimum vilja ísraelsmenn hava fatur á. Arafat hevur svarað, at menninir verða ikki útflýggjaðir.

47 aðrir palestinar hava givið seg yvir til ísraelska herin í Ramallah.

Deyðshjálp lóglig

Myndugleikarnir í Belgia hava gjørt av, at læknar skulu fáa loyvi at veita fólki deyðshjálp. Frammanundan hevur grannalandið Niðurlond gjørt deyðahjálp lógliga.

Belgiska stjórnin samtykti fyri nøkrum døgum síðani um tær neyðugu broytingarnar í verandi lóg. Samstundis hevur stjórnin gjørt av, at ein serlig nevnd skal halda eygað við, at reglurnar verða hildnar. Sambært reglunum skulu læknarnir útfylla eitt spurnarblað, hvørja ferð teir geva deyðshjálp.

Belgiska tjóðartingið samtykti longu í mai at loyva deyðshjálp. 86 tinglimir atkvøddu fyri og 51 ímóti. Ein meiningakanning í síðstu viku vísti, at 72 prosent av fólkinum taka undir við nýggju lógini.

Eingin fundur

Ætlanin var, at umboð fyri Spania og Marokko skuldu hittast í gjár at tosa um ósemjuna millum londini um ta lítlu oynna Perejil ella Leila, sum liggur tætt inni undir marokkansku strondini.

Men fundurin varð av ongum, tí sunnukvøldið boðaði marokkanski uttanríkisráðharrin, Mohamed Benaissa, frá, at hann hevði avlýst ta ætlaðu ferðina til Madrid, og at hann tí ikki fór at hitta spanska uttanríkisráðharran, Ana Palacio.

Almenna marokkanska grundgevingin er, at ein sponsk tyrla setti seg á teirri umstríddu oynni sunnudagin. Í avlýsingini hjá uttanríkisráðharranum stóð, at Spania hevði enn einaferð gjørt seg inn á marokkanskt loftrúm og land.

Fara at svara aftur

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevur sambært New York Times kunnað Hvítu Húsini í Washington um, at Ísrael fer at svara aftur, um irakar fara at skjóta rakettir eftir málum í Ísarel, tá og um USA loypur á Irak.

Undir Flógvakrígnum í 1991 skutu irakar 39 Scud-rakettir eftir málum í Ísrael. Tá svaraðu ísraelsmenn ikki aftur. Hetta komst av, at amerikanarar noyddu Ísrael til at binda frið, tí eitt ísraelskt aftursvar hevði forkomið arabiska stuðlinum til amerikanska álopið.

Ein meiningakanning í Ísrael hevur vist, at tveir triðingar av fólkinum halda, at næstu ferð skal Ísrael svara iraksk um rakettálopum. Sharon og aðrir ísraelskir politikarar vilja vera við, at nógvir arabarar tulkaðu tað sum ein ísraelskan veikleika, at landið ikki svaraði iraksku álopunum í 1991.

Toppfundur í Danmark

Leiðarar úr 25 londum í Evropa og Asia halda í hesum døgum toppfund í Keypmannahavn.

Talan er um londini í tí sonevnda ASEM-samstarvinum, sum umfatar ES og tíggju lond í Asia. Høvuðsevnið á fundinum í Keypmannahavn er búskaparligt, sosialt og mentanarligt samstarv, men harumframt verða eisini samráðingar millum einstøk lond. Eitt nú skulu Suðurkorea og Japan hava ein fund sínamillum, og ES skal eisini hava fund við Kina.

Trygdartiltøkini í Keypmannahavn eru sera umfatandi, og løgreglumenn úr øllum landinum hava fingið boð um at koma til Keypmannahavnar at hjálpa løgregluni har. Herumframt hava teir einstøku leiðararnir ein riðil av trygdarmonnum og lívverjum við sær til Danmarkar.